# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Johanna Maria Olsen á hundrað ára degnum

Lag: Kamferkistan…

*So fáum unnast tað áratal,*
*sum tygum í dag hava nomið -*
*hjartans heilsa tí ljóða skal*
*frá øllum, sum her hava komið.*
*Kenslur nerta við hjartastrong,*
*so hugnaligt er tað at síggja -*
*tygum so birg eftir ár so mong*
*— seta á øldina nýggja.*

*Mangt umbroytist - tað gamalt er -*
*á mansins ævi, vit vita,*
*men hjá tí, sum um hundrað fer,*
*man farri av sorgblídni sita.*
*Alt, sum sermerkti hendan stað,*
*tá tygum í túninum spældu,*
*er heilt hamskift til hendan dag*
*– spunnið á nornunnar snældu.*

*Tógvið stríð — mangan strævið var -*
*og hentleikar eingir tá vóru,*
*bundið varð mangt eitt hosupar,*
*meðan tit dylluna bóru.*
*Eingir knøttar at trýsta á –*
*áh høvdu teir gomlu nú vita,*
*lívskrav teirra var eittans tá*
*– heitir og mettir at sita.*

*Nú sólin stavar úr vestri lágt,*
*av roðanum tindarnir rodna –*
*gott var seiggið – og treiskni seigt,*
*ið eyðkendi lívsneistan forna.*
*Hjartans ynskir frambera vit –*
*frá Harranum signing ríka,*
*kvøldarfjøll bera koparlit*
*í tign yvir merkisstund slíka.*

**NePtuN**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

## 100 ára móttøka fyri fullum húsum

**Tá móttøka var í VB-Húsinum í gjár, í samband við at Hanne Mia Olsen fylti 100 ár, var fult hús. Almenn umboð, vinir og næstringar møttu upp. Løgmaður hugleiddi skemtiliga í røðu síni, at lívið eftir øllum at døma er harðari við mannfólk**



Føðingardagsbarnið tóktist vera væl fyri, tá farið varð undir sjálvt føðingardagshaldið

100 ÁR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í Vági var stórur dagur í gjár. Johanna Maria Olsen fylti 100 ár og dagurin byrjaði við, at skúlabørn og dagstovnabørn møttu uttanfyri húsini hjá Hanne Miu, ið kom út at heilsa mannamúgvuni.

Klokkan 15 í gjár var so almenni parturin av degnum. Umboð fyri kommunu, landsstýrið, ríkisumboð, løgtingsmenn og vinir og næstringar heiðraðu Hanne Miu í fullsettum VB-húsi.

Løgmaður Jóannes Eidesgaard, Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum og vágbingur, Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum, ríkisumboð og løgtingsmenninir í bygdini vóru komnir at heilsa Hanne Miu og fleiri teirra bóru fram røður.

Kirsten Strøm Bech, borgarstjóri í Vági, beyð vælkomin. Síðani hildu almennu umboðini røður. Løgmaður tók skemtiliga til, at tað hann visti, so fylla 6 føroyingar 100 ár í ár. Men bert ein av hesum seks er mannfólk, og tað segði løgmanni so mikið, at: "..lívið er harðari við okkum mannfólk", hugleiddi løgmaður skemtiliga. Hans Pauli Strøm røddi eisini og tosaði m.a. um stóru broytingarnar, ið tíðin hevur við sær. Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, heilsaði gummuni og eisini hann hevði m.a. tíðarbroytingarnar á lofti.

Hanne Mia fylgdi væl við í tí, ið sagt var á stóra degnum. Hon er púra klár, tá at oyruni bila eitt sindur.




Løgmaður helt skemtiliga fyri, at tilveran helst var nakað harðari við mannfólk, sum sjáldan røkka somikið høgum aldri



Sjálvandi hoyrir ein ordiliga føðingardagskaka til ein ordiligan føðingardag

Heini Klakkstein:

## 20 ár hjá Shell




Mikudagin 15. mars 2006 hevði Heini Klakkstein 20 ára starvsdag hjá Føroya Shell í Norðoyggjum. Heini hevur øll árini koyrt tangabil, men hevur eisini hjálpt til við oljufýrtænastuni.

## Minningarorð um Nancy Werning

**f. 3. mai 1937 d. 3. mars 2006**



Tað er 3. mars. Kavin dettur so hvítur niður og fjalir foldina, alt er so ómetaliga vakurt. Tú plagdi at siga, bert Gud veit hvat kavin goymir.

Boðini eg fekk tíðliga í morgun, dugdi eg illa at trúgva, »Nancy er farin«, tað ljóðaði so ótrúligt, vit plagdu at tosa saman hvønn dag. Hon plagdi at støkka inn á gólvið hvørja ferð hon gekk forbí, hon kom inn, setti seg eina løtu og so tosaðu vit um alt.

Vit høvdu so ómetaliga nógv at tosa um, men tað, sum fylti mest, var tað andaliga, tí óansæð, hvat man snakkaði um við Nancy, so vendist samrøðan altíð inn á tað, sum lá fremst í huga hennara, Jesus, sum hon hevði eina forankraða trúgv á, og sum hon ongantíð krógvaði. Síðan var tað børn og barnabørn, sum hon var so glað fyri.

Saknurin verður stórur, tað verður trupult at fylla tað tóma plássið í samkomuni eftir hana, hon var altíð har, altíð fús at bera eitt orð fram og syngja onkran sang. Ein sangur, sum hon sang fleiri ferðir var:

*»Andlit Jesusar at síggja,*
*á, hvør gleði verður tað.*
*Hann í skýggjunum at hitta*
*har hann kemur skjótt ein dag«.*

Nú skoðar hon andlit hansara, sum hon setti sítt álit á.

Góðu Henry, Fía, Hans Pauli, Anita og børnini, má Harrin troysta og styrkja tykkum í tykkara stóru sorg, tit hava mist eina góða konu, mammu, vermammu og ommu.

Friður verið við minninum um Nancy. Takk fyri alt, sum tú var fyri okkum.

**Dagnhild**